Nr. 6 September 2017 69. árið

KIRKJULIGT MISSIÓNSBLAÐ



*Elsa veitir sjúkrarøkt í Konso.*

# Til minnis um Elsa Jacobsen, kristniboðara

Í 32 ár virkaði Elsa Jacobsen úr Norðagøtu sum trúboðari í Etiopia. Í hesi útgávuni av Kirkjuliga Missiónsblaðnum ynskir Kirkjuliga Missiónsfelagið at minnast Elsu og vísa takksemi fyri tað stóra arbeiðið, ið hon hevur staðið í. Í blaðnum eru heilsanir frá trúboðarum og missiónsfeløgum, ið hava samsvarva við Elsu og kendu hana. Eisini er tað okkara vón, at Elsa má vera eitt fyridømi fyri okkum. At neyðin fyri, at menniskju um allan heimin mugu hoyra gleðiboðskapin um okkarra frelsara Jesus Kristus, eisini verður okkum kveikt í okkum – soleiðis at vit bæði úti og heima kunnu vera amboð í Guds hond, so fleiri hoyra um frelsuna í Jesusi og verða frelst.

Vegna Kirkjuliga Missiónsfelagið

Silas Olofson

# Hvem er den syvende?

Elsa er død 89 år gammel. Måske langt målt med jordiske alen, men intet imod evigheden.

Alle eksisterer evigt, og det afgørende er, om evigheden skal være sammen med Jesus i Guds herlighed eller om evigheden skal tilbringes i fortabelsen under Guds vrede. Gud vil at alle mennesker skal frelses. Gud har gjort det muligt for alle i Jesus at blive frelst. Men evangeliet skal høres (Rom 10,14ff). Det vidste Elsa.

Hun skriver: ”Miljónir av menniskjum doyggja í hjálparloysi, uttan nakra vón. Einans i Etiopiu eru miljónir av menniskjum, sum ikki enn hava hoyrt Jesus navnið nevnt. Vilt tú vera við til at bera gleðisnboðskapin út til teirra, sum sita i deyðans myrkri og skugga?”

Men Elsa vidste også, at der var et vigtigt arbejde at gøre hjemme, så når hun blev hilst med ordene : ”Jesus fylgi tær og styrki teg i arbeiðinum” svarede hun: ”Jesus veri eftir hjá tykkum og styrki tykkum í arbeiðinum”, som vi kan læse i Elsas bog ”Etiopia kallar” fra 1966 (side 74).

Der er et arbejde, der skal gøres hjemme med dåb og nadver, forbøn, husbesøg, orgelspil, sang, andagter, søndagsskole, osv., osv. men også for at støtte dem, der fik kald og nåde til at rejse ud som missionærer.

Elsa havde et privilegium og det var hendes familie. Her tænker jeg ikke kun på Jakob og Johannes og deres familier, men på Elsas søskende og deres familier. Der var en fælles missionsild, der brændte i dem og som også betød, at de stod sammen om at fremme missionsarbejdet både mens Elsa var ude og efter at hun kom hjem. Og der var en fælles nød om at blive bevaret på sandhedens grund, på Guds Ords grund – også selvom det kostede. Det er jo kun sandheden, der kan frigøre og ham, som er sandheden, der kan gøre os frie (Johs 8,31-32).

Esmar rejste med Elsa, når der skulle berettes fra missionsmarken. Emma har mere end én gang spillet til et misionsmøde, og solgt bøger i Luthers boghandel, der fremmede missionens sag. Lea har gang på gang på gang lagt bil til, så der var mulighed for at deltage i missionsstævner. Og i Gøteborgen i Thorshavn lånte vi andre Elsas lejlighed og Óluva tog sig ikke blot kærligt af Magnus, men også os andre. Fra Hvannasund kom Anna og Justinus, og gang på var gang det Justinus, der lagde os et vigtigt ord om missionen på sinde. Og sådan kunne vi fortsætte rundt i familien.

Gang på gang har vi siddet ved vinduet i Tróndargøta i Norðragøta, bedt og drukket kaffe og delt et Guds Ord. Der er steget megen forbøn op fra bygden Gøta for missionsarbejdet, men også lagt mange kroner i indsamlingskurven til missionen og i det gamle missionshus stod en af de gamle indsamlinsgbøsser, hvor en afrikaner pænt nikkede tak for gaven, når en mønt blev lagt i.

Elsa var den første, der blev udsendt af Kirkjuligt Missionsfelag, og den eneste, der kun havde KMF som sendende selskab. De næste 5 missionærer blev udsendt i samarbejde med Luthersk Missionsforening. Dvs. at indtil i dag har

KMF alene eller sammen med andre sendt 6 missionærer ud. Først Elsa, siden Doris Heinesen, siden Peter og Anne-Lene Olofson og sidst Silas og Julianna Olofson. Elsa ville i dag uden tvivl stille dette spørgsmål til os, der endnu har en tid på denne jord: Hvem bliver den syvende? Hvem bliver den syvende udsendt af Kirkjuligt Missionsfelag?

Ikke fordi at KMF ikke har støttet andet missionsarbejde f.eks. radiomission, eller fordi Elsa ikke glædede sig over missionærer, sendt af andre. Og det er heller ikke nogen betingelse, at man skal udsendes fra kirken i Klaksvig, selvom alle seks er udsendt fra kirken i Klaksvig (Elsa fra den gamle og de fem andre fra Christianskirken). Men Klaksvig og Emmaus har også været en vigtig del af Elsas bagland. Elsa brændte for at evangeliet skulle ud, derfor spørgsmålet: Hvem er den syvende?

Tak for Elsas tjeneste og vidnesbyrd fra en af de seks. Peter O.K. Olofson

# Hilsen til Elsa Jacobsens begravelse

Luthersk Missionsforening i Danmark vil gerne bringe en hilsen i forbindelse med Elsa Jacobsens død og begravelse. Vore tanker og medfølelse er i disse dage gået til jer i familien – både den færøske og den etiopiske del – som har mistet et kært familiemedlem. Men også til vore venner i Kirkjuliga Missionsfelagid, som har mistet en trofast medarbejder og udsending gennem mange år og en, som gennem mange år har været en stor støtte for missionens arbejde på Færøerne.

Elsa Jacobsen har været missionær i Etiopien gennem en menneskealder. Særlig Konso-folket var hendes første kærlighed. Elsa har udført et utrætteligt arbejde i sundhedsarbejdet i Etiopien. Hun var også altid rede til at komme med et godt vidnesbyrd om Jesus, når anledningen var der. Elsa brændte for at etiopierne skulle lære den Jesus at kende, som hun selv var kommet til tro på. Hun var missionær i både handling og ord.

Mange missionærer fra Luthersk Mission er dybt taknemmelige for et godt og berigende samarbejde og arbejdsfællesskab med Elsa gennem årene i Etiopien. I Luthersk Mission i Danmark er vi taknemmelige for adskillige besøg, hvor Elsa har holdt foredrag om Etiopien eller aflagt vidnesbyrd om sin Herre og Mester.

Elsa har fuldført løbet og nået målet. Vi er Gud taknemmelige for alt, Han gav os gennem Elsa og for den store velsignelse, som hun bragte med sig til mennesker i Etiopien.

Jesus siger: ”Jeg er opstandelsen og livet; den, der tror på mig, skal leve, om han end dør. Og enhver, som lever og tror på mig, skal aldrig i evighed dø”. Det håb levede Elsa på. Og det håb, levede hun med. Hun er nu gået over til det evige liv sammen med sin Frelser.

Æret være Elsas minde.

På vegne af Luthersk Missionsforening

Missionskonsulent Bent Olsen

Klaksvik, den 21. august 2017.

# Kære missionærer!

Hjørdis og jeg er i øjeblikket på besøg hos Doris i Klaksvik, hvor vi nyder stor gæstfrihed. Solen skinner på de grønne bjerge rundt omkring byen og spejler sig i fjordens rolige vande mellem øerne. Sejlbåde og kuttere går ud og ind nogle få meter uden for vinduerne her. Det er et utroligt smukt sceneri.

I torsdags deltog vi i begravelsen for Elsa Jacobsen i Gøte. Det var en velsignet gudstjeneste i den store og forholdsvis nye kirke. Ved ankomsten gik alle frem og lod et øjeblik hånden hvile på kisten for at mindes Elsa. Derefter hilste alle på den nærmeste familie på de øverste bænke. Deltagelsen var på 420 personer.

En nevø af Elsa, Simon Jacobsen, præst i et nabosogn, talte over bl.a. Ef 2,8: Af nåde er I frelst ved tro, det skyldes ikke jer selv, Guds er gaven. Det skyldes ikke gerninger, for at ingen skal have noget at rose sig af. For hans værk er vi, skabt i Kristus Jesus til gode gerninger, som Gud forud har lagt til rette, for at vi skal vandre i dem.

Præsten indledte sin tale med ordene: Elsa og Jesus …. Han talte rigtigt godt om Elsas liv og tjeneste (som det er refereret for Hjørdis og mig). På forhånd havde Kari og Johannes Olafsson og jeg fået tilladelse til at bringe korte hilsener inden sidste salme i kirken, da der ikke er tradition for at bringe hilsener ved samværet bagefter. Johannes og Kari trak linjerne tilbage til Elsas kontakt til Island og til hendes første år i Konso, ligesom de citerede en hilsen fra Sigmund Lende, hvor han beskrev samarbejdet med Elsa i Yirgalem. Kari nævnte også, at der samtidig med begravelsen var en kreds af missionærer samlet i Stavanger for at mindes Elsa.

Jeg gengav kort en hilsen fra LM skrevet af Bent Olsen, hvor han understreger et godt og berigende fællesskab og samarbejde med Elsa. Jeg føjede nogle ord til om vores personlige relation til Elsa gennem mere end 40 år. Citerede også lidt fra et langt brev fra hende skrevet i Arba Minch den 2. okt. 1991 til danske missionsvenner: Dørene står vidt åbne overalt, og ingen lægger os hindringer i vejen, når vi forkynder evangeliet. – Kære missionsven: Hvor er det stort, at vi får lov til at være med i tjenesten ude blandt folkeslagene og hjemme. Måtte vi alle, som tilhører Jesus, blive bevaret i troen, indtil vi når frelst hjem. Lykke til i tjenesten, indtil han kommer! Tak for forbøn! Hilsen Elsa. - Det siger ikke så lidt om Elsa. Hun blev 89 år.

Kirken var meget smukt pyntet med mange store blomsterdekorationer med bånd med navn. Doris´ meget smukke krans med bånd, blomster fra NLM og fra os blev anbragt lige foran kisten, som var pyntet med blomster i lyse, sarte farver. Efter jordfæstelsen var der samvær i kirkens store lokaler med smørrebrød, kage, te og kaffe til alle, og man kunne tale med familie og pårørende.

Vi har hørt, at der har været lækså i Konso, Arba Minch og Awasa.

Elsa har fuldført sin tjeneste for Jesus og hviler nu hos Gud indtil opstandelsens morgen.

Jakob og Johannes gik forrest og var med til at bære Elsa ud til kirkegården – i kraftig blæst, regn og drivende skyer. Vi har været sammen med Etiopierne flere gange, både hos Doris og i deres egne hjem. Det er en stor oplevelse og en velsignelse at være sammen med dem og opleve fællesskab i troen på Jesus. De klarer sig godt, har arbejde, hus og bil, og de unge er godt i vej med uddannelse. De er i dyb sorg, for Elsa var midtpunktet i deres daglige liv og tilværelse. Hun brugte utallige timer med praktisk hjælp til både små og store, f.eks. lektiehjælp, papirarbejde angående visum, arbejds- og opholdstilladelse, forældremøder i skolen m.m. I får deres navne, så kan I tage dem med i forbøn:

Jakob og Kitinesh med Dina, gift med Getenet, Miriam, Bereket og Eliesar

Johannes og Tsehainesh med Jonas og Jeru.

Elsas tilbageværende søskende er: Petra, Oluva, Lea, Anna, Emma, Jonhil og Per.

Guds fred og alt godt!

Hilsen fra Færøerne fra Doris, Hjørdis og Jørgen



*Hetta er manningin í Konso í 1960-unum. F.v.: Skúli og Kjellrún við 5 børnum, Ingibjørg og Jónas við trimum børnum og Elsa.*

# Nogle glimt fra mit møde med Elsa Jacobsen

Da jeg rejste til Etiopien i maj 1971, kendte jeg ikke Elsa personligt. Jeg var i kirke, da hun blev indviet og sendt ud som missionær, og vi havde skrevet lidt sammen i forbindelse med min udrejse.

Efter nogle dage i Addis Abeba blev jeg sat på et primitivt fly til Arba Minch, og rejsen fortsatte i landrover op til Gidole, hvor jeg mødtes med Elsa. Hun skulle rejse hjem på orlov en måned senere, og jeg skulle afløse hende og sættes ind i arbejdet, inden hun rejste. Det var meget overvældende. Jeg fik et par dage til at falde til i Gidole, og så var det ned på hospitalet og på arbejde.

Jeg lyttede og sugede til mig. Det var det eneste, jeg kunne. Jeg var på klinikken sammen med Elsa, hvor hun behandlede patienter, på sengeafdelingen og operationsstuen, hvor hun af og til gav narkose. Jeg opdagede hurtigt, at hun havde en utrolig arbejdskapacitet, var meget dygtig og havde et stort hjerte for både de syge og medarbejderne. At holde andagter på sygehuset så hun også som en vigtig opgave. Hun satte stor pris på bibelkvinden Aster, der gik sin stille og vise gang blandt patienter og pårørende med et Guds ord i rette tid. I min verden var de begge to enestående. Det hele var en ny og anderledes verden for mig. Elsa havde været 10 år i landet og jeg nogle dage. Jeg spiste hos hende hele måneden, og vi fik snakket om mange ting. Hun forventede meget af mig.

Set i bakspejlet har vi ofte moret os over den første tid i Gidole. Alt var naturligt for hende, men nyt og fremmed for mig, inkl. de forskellige sprog.

Jeg husker et vers, som hun ofte sang:

Snart er jeg hjemme og står for tronen,
hvad gør det da, om solen har mig brændt.
Når hytten falder, så får jeg kronen,
og al elende er da dermed endt.

Himmellængselen, forventningen og målet havde hun altid for øje.

Hun elskede at være sammen med med missionærer og etiopiere. Der var et lille orgel på missionsstationen. Det blev båret rundt mellem husene efter behov ved særlige anledninger. Om aftenen spiste vi jævnligt sammen og delte nogle af dagens højdepunkter, og så kunne vi høre de nyheder, som stationsstyreren havde modtaget på radiotelefonen fra de andre missionsstationer. Sluttede aftenen med andagt. Godt fællesskab. Elsa var et farverigt, positivt, givende og festligt menneske at være i stue med. Og et åndeligt menneske.

Luther holdt mange bordtaler. Det gjorde Elsa også, men de er ikke blevet nedskrevet, som Luthers blev det. De fleste bordtaler hørte jeg senere i Gøte, når der var fødselsdag. Altid en bordtale til fødselaren og et Guds ord til vedkommende og os andre.

Bortset fra den første måned i Gidole var vi aldrig placeret på samme missionsstation, men arbejdede i samme synode og i samme område. Der var ikke mere end 50 - 100 km imellem os, men bakkerne i Gidole og Geresse, floderne og vejen til Konso var ikke altid så fremkommelige. Det kunne godt tage mange timer at nå frem. Så der blev ingen søndagstur.

Jeg husker også Elsa fra Konso. Et stort

arbejdspres med mange patienter og mange tilrejsende og nødhjælpsarbejdere. Hun var myreflittig. I Konso havde hun en overgang en symaskine stående på skrivebordet, og var der et ledigt minut, syede hun en søm eller to på et eller andet til sengeafsnittet.

Foruden arbejdet på klinikken i Konso gik Elsa også ud i landsbyerne og samlede kvinder og børn på en åben plads, hvor hun underviste dem i håndarbejde og holdt andagt. Og så sang de på deres eget sprog. På vejen dertil var der ofte en hale af børn, der bekendtgjorde, at nu kommer Elsa. Af og til stak hun hovedet ind i en hytte og spurgte til folk for at give dem en opmuntring. Igen en arbejdsevne og vilje uden lige. Det er ikke bare bare at være ude i varmen i Konso om eftermiddagen. Men Elsa var villig til at gå og forkynde fredens evangelium.

Dette skete ikke kun i Konso. Efter en lang arbejdsdag på hospitalet i Arba Minch tog hun ofte en hvid kittel uden på sit private tøj og for så af sted for at holde aftenandagt for de syge og deres pårørende.

Jeg er Gud taknemlig for at have lært Elsa at kende og være vidne til hendes tro og kærlighed til Jesus. Den kom til udtryk i både ord og handling.

Hun var et herligt menneske.

Ære være hendes minde.

Doris



Elsa hevur fingið vitjan av Doris Heinesen, sum frá 1971 eisini virkaði í Etiopia

**Hilsen fra Norsk Luthersk Misjonssamband og Samband Islendskra Kristniboðfelaga**

Norsk Luthersk Kinamisjon sendte de første misjonærene til Kina i 1891. Da Kina sendte alle misjonærer ut av landet i 1948, reiste flere av de norske misjonærene til Etioia. Misjonen skiftet da navn og ble til Norsk Luthersk Misjonssamband. NLM.

I 1954 kom den første islandske misjonæren til Etiopia. Det var Felix Olafsson og hans kone Kristin. De kom til Konso i sør Etiopia. Litt etter kom sykepleier Ingun Gisladottir også til Konso.

Min kone Aslaug arbeidet på denne tid på oversøsters kontor ved sykehuset i Reykjavik. Hun fikk en dag beskjed om å ta imot en sykepeleier fra Færøyene - som kom til viderutdannelse. Det var Elsa Jacobsen. Elsa ble en nær venn av oss.

I 1960 dro vi alle tre til Etiopia, Elsa kom først til Konso – der hun overtok etter Ingunn Gisladottir som leder av det totale helsearbeid i Konso på den tid. Aslaug og jeg kom etter hvert til Gidole Hospital. Der var tett kontakt mellom klinikken i Konso og sykehuset i Gidole. Trafikken gikk begge veier. Av og til tok jeg en tur til Konso klinikken for å hjelpe til med eventuelle kirurgiske problem.

Konso klinikk var en svært aktiv klinikk, blandt annet med mange ti-talls fødsler i året. Der fantes et stort spekter av sykdommer. Noen ganger kunne Elsa komme kjørende selv med en pasient eller en komplisert fødsel til Gidole. Elsa fikk hele 32 år i Etiopia, i tillegg til Konso; også ved Arba Minch Hospital, Yirgalem Hospital og i Geresse - og Galta klinikker.

NLM sender nå en hilsen og takker for Elsas mange årige tjeneste i Etiopia. Vi lyser fred over hennes minne.

NLM ble misjonen som tok imot misjonærer fra flere andre misjoner her i NORDEN.

Elsa ble utsendt av Kirkjuliga Missiónsfelagið her i Færøyene.

Felix Olafsson og Kristin, Ingunn Gisladottir og mange andre ble utsedt av SIK som er Samband Islendskra Kristnibodfelaga.

SIK sender ved denne anledning en hilsen og takk:

Vi som ble kjent med Elsa og arbeidet med henne i Etiopia sier takk og lov til herren for hennes trofasthet, vitnesbyrd og tjeneste. Gud velsigne hennes minne! Vi hilser med Salme 121:

”Jeg løfter mine øyne opp til fjellene. Hvor skal min hjelp komme fra.
Min hjelp kommer fra Herren, himmelens og jordens skaper.”

For SIK Island: Ragnar Gunnarsson

Dansk misjon kom inn i et samarbeid med NLM rundt 1970. Doris kom til Etiopia utsendt av både Luthersk Missinsforening i Danmark og Kirkjulega Missionsfelagid i Færøyene.

Videre fikk NLM i Etiopia også utsendinger fra Finland.

NLM ble en slags PARAPLYORGANISASJON i Etiopia Vi var fra flere land. I dag spiste vi frokost hos Doris og var altså fra Danmark, Island, Norge og Doris som er hjemme her. Slike fellesskap opplevde vi mange av i Etiopia.

Lege Sigmund Lende og kona Berit sender denne hilsen til dagen.

”Vi arbeidet med Elsa på sykehuset i Yirgalem på 80 tallet. Hun var et forbilde for oss alle med sin frimodighet. Hun var utrettelig og hadde et oye for alle, sørlig de minste og de som andre overså. Hun sparte seg aldri og hadde alltid et ord til trøst og oppmuntring. Og vi hørte aldri at hun var trett.”

Til sist en hilsen fra Konso ved Engida Kussia.

Sorry to hear the death of our sister and mother of Konso, Elsa. She speakes KONSO language very well. I interviwed her when she came to Konso last time.

Please, pass my condolence to the relatives, Johannes and Jacob, her sons.

I will pass this news to Konso Parish as well. Thank you for sending me the information abotut her back ground. If possible, please send me her biography so that we can write in Konso Church history. Engida.



Berischa Hunde, prestur i Konso, konan Adjunna saman við Elsu og Doris í Missiónshúsinum við Landavegin í 1992.

# Jesus og Elsa

*Prædikan, ið Símun Persson Jacobsen helt í Gøtu Kirkju í samband við jarðarferðina hjá Elsu Jacobsen*

Tað er ikki nakar langur setningur, men avspeglar tó alt lívið, ið Elsa fekk loyvi at liva.

Relatiónin var borin av kærleika, og takkandi kundi Elsa dagliga lovsyngja sínum Harra og frelsara, meðan hon undraðist yvir ta náði og góðsku, ið sýnd var henni.

Við dópsgávuni fekk Elsa loyvi at liva í trúnni. Við at søkja nærveru Harrans fekk hon eisini áhaldandi loyvi at kenna fylling Andans.

Og tað er ikki sørt, at hon kendi seg ríka, ja, við brøðrum og systrum í Harranum var eisini hon samarvingi Kristusar til allar teir óforgongiligu lutir í Guds æviga ríki, har eingin pína, sorg ella deyði valda.

Við sakni og stórum missi kunnu vit tó eisini gleðast hennara vegna. Jú, trúgvin sær og kennir nakað óendaliga stórt, ið vit bert kunnu fáa frá Jesusi.

Við at liva lív sítt í Jesu kærleika, komu heilagu Skriftirnar og Elsa eisini at liva óloysiliga saman.

Bíbliubókin var Elsu ein ótømandi kelda, sum hon dagliga drakk av. Frá hennara óteljandi vitnisburðum um Jesus runnu løkir av sama livandi vatni mongum til signingar.

Í Halgubók sá Elsa, at menniskja er skapað í Guds egnu mynd, og frá upphavi var alt so sára gott.

Frá somu keldu fekk Elsa eisini at sjá menniskjans fall burtur frá Gudi, og tess fylgir kenna øll menniskju persónliga til.

Elsa var jú heldur ikki fullkomin, so frætt kendi hon sítt egna hjarta, men ósigiliga takksom var hon fyri Guds hjarta og fullkomna kærleika hansara, ið sendi Jesus í heimin fyri at frelsa veruligar syndarar, og har var hon so ein av mongum, ið fegin tók ímóti gávuni yvir øllum gávum.

Leita vit frá hesi gávu til aðrar signingar, so fekk Elsa sum fimt elst loyvi at vaksa upp í einum barnaflokki á trettan.

Sunnva og Eliesar vóru gudsóttandi fólk, ið vóru merkt av einum tænandi sinnalagi fyri tí Harra, ið tænti teimum fyrst. Hetta hjartalag hevur síðani nátt út á víðar víddir, og tað takka vit fyrst og fremst Gudi fyri.

Tíðliga lærdu foreldrini Elsu at ganga kirkjuvegin, og trúføst og glað fór hon eisini í sunnudagsskúla, og er hon alt lívið eisini komin til møti og bønarmøti.

Tað sum henni var lagt á hjartað, gav hon øðrum, og ikki vóru tað mong møti, har hon ikki hevði ein vitnisburð, og altíð undirstrikaði hon tað, sum Jesus hevði gjørt fyri okkum.

Og tí skulu vit eisini hesa løtu hoyra eitt av Jesu krossarorðum inn yvir lív okkara: Tað er fullgjørt.

Og hesin søguligi veruleiki, ið var blivin Elsu so ljóslivandi, kom síðani við Harrans kalli at ávirka allar teir gerningar, sum hon í lýdni kom at útinna – eisini í Etiopia.

Men áðrenn tað, endaði hon við UG á sjúkrasystraskúlanum í Havn. Elsa arbeiddi bæði í Íslandi og Noregi, og gjørdist síðani á bíbliuskúla í Noregi greið yvir sítt kall, og við tí fyri eyga lærdi hon so eisini til jarðarmóður í Bretlandi.

Jú, ein ávís globalisering var longu yvir Elsu í 50´unum. Í 1960 var hon, sum tann fyrsti kristniboðarin, send út beinleiðis úr Føroyum. Tað var eitt lutvíst lítið og tó sera sterkt og trúfast bakland í Kirkjuliga Missiónsfelagnum, ið stóð aftan fyri Elsu øll árini. Tað skulu tit hava tøkk fyri.

At fara til Etiopia í 1960 var fyri Elsu sera stórt stig inn í tað ókenda, og sum undangongu-kvinnu kendi hon seg ikki sterka og sjálvsikra, men setti alla vón sína á hann, ið er alfa og omega, hin alvaldi.

Hetta hoyrdi hon í gomlu kirkjuni í Klaksvík, tá ið hon varð útsend, og sjálvt um hon onkuntíð kundi halda, at Gud hevði sera góða tíð, so helt hon seg tó altíð til hansara, og hon fekk at kenna, at Harrin er góður.

Og ein góð gáva, ið spretti úr svárari støðu, var, tá ið ein pápi kom til Elsu við tvíburanýføðingum. Mamman doyði undir føðingini, og nú var so spurningurin, um Elsa vildi verða mamma teirra.

Jú, mong vóru yvirraskilsini á stóra kontinentinum, og hetta mundi vera eitt hitt størsta, og síðani tá eru vit øll komin at kenna teir sum Jákup og Jóhannes. Fyri Elsu var tað ein sonn gleði, at hava teir og fantastisku familjur teirra rundan um seg her í Norðagøtu.

Eftir stendur: Elsa elskaði tykkum, og tit elskaðu hana. Tað er av sonnum ríkidømi.

Í Etiopia kom Elsa at hjálpa fólki í túsundatali. Dagligu bíðirøðirnar vóru ovur langar, og sjálvt um tíðirnar kundu vera strævnar og sera avbjóðandi, eisini beinleiðis harðrendar undir komunistiskum og harvið eisini ateistiskum stýri, so hvíldi Elsa í kallinum.

Og júst Guds kall er avgerandi í mótburði.

Elsa fortaldi mær einaferð: Tey, ið komu út á missiónsmarkina fyri at uppliva ævintýrið, rýmdu skjótt, tá ið hart leikaði á.

Av tí at Elsa var so sera røsk at skriva heim, og síðani siga frá og sýna myndir, tá ið hon var heima, so fingu mangir føroyingar nógv áhugavert at vita. Mong fingu eisini eitt brennandi hjarta fyri kristniboðani í Etiopia. Tøkk til tykkara, ið bóðu og stuðlaðu Elsu.

Eftir 32 árum kom Elsa heim aftur í 1992, og seinni fekk hon sum sagt alla familjuna við sær; Eliesar var so borin í heim í Føroyum.

Og tað hevur verið mær ein sonn frægd at hoyrt ommubørnini fortelja um Elsu. Øll frásøgn teirra vitnar um eitt ríkt og gevandi

lív, har Elsa var eitt satt samlingspunkt í familjuni.

Í umsorgan tænti hon bæði við dagligum máltíðum, skúlahjálp og vegleiðing í Skriftini.

Við gávumildni, eggjanum og einum lurtandi oyra, var hon sera skiljandi fyri avbjóðingum og tí eisini nærverandi sum omma.

Elsa var alt fyri tykkum og kundi bæði flenna og gráta saman við tykkum. Sum fyrimynd á so mongum økjum lærdi hon tykkum eisini at ganga hin sanna vegin, og tað er óendaliga stórur arvur at lata eftir seg.

Jú, Elsa var nakað serligt, og fyri henni vóru tit einki minni. Tí verður saknurin ovurstórur tykkara millum, eisini hjá Leu, ið hevur verið Elsu so ómetaliga nær.

Mangan koyrdu systrarnar saman. Fríggjadag seinnapart var Elsa líka til tað síðsta fastur gestur á Gøtubrá við tí góða orðinum. Sjálv byrjaði hon hvønn dag fyri Harrans ásjón á knøum við songarstokkin, og síðstu ferðina hon fór út av húsinum, segði hon við systrina: Fá mær bíbliuna við.

Og uttan ótta og ekka livdi hon við bíbilsku orðunum: Um Gud vil. Dagliga heilsaði hon sínum við orðunum: Jesus veri við tær.

Jú, av Guds orði var Elsa myndað. Jesusi vildi hon fylgja, og tí var Skriftin eisini rættisnórur hennara í øllum lívsins viðurskiftum. Sjálvt um hon var løtt í sinni og kundi skemta, so var eisini ein álvarsom síða av Elsu, og ta síðuna fjaldi hon ikki í álvarsmálum.

Var tað ein kirkjulig innbjóðing til danskar biskoppar, ið høvdu góðkent eina kirkjuliga markering av borgarliga inngingnum partnarskapi, so segði hon alment frá, sjálvt um hon eisini var góð við tey samkyndu.

Ella vóru tað føroyskir politikarar, ið ætlaðu sær at broyta sjálva hjúnabandsskipanina, sum nú er broytt, so segði hon eisini frá, og tað kundi hon gera ógvuliga kontant.

Skuldi Elsa velja ímillum stílkarakter ella sannleikan í avgerandi málum, sum er okkum opinberaður í Halgubók, so var hon ikki í iva, óansæð hvat fólk síðani vildu halda um hana.

Ongantíð gramdi hon seg um smáting, men tað sum hevur týdning í samfelagi og kirkju, læt hon tíbetur ikki eyguni aftur fyri, og trúgv mær: Elsa var hvørki blind ella sløv í andligum viðurskiftum, og tað er nútíðin longu eitt greitt tekin um.

Við hesum í huga var Elsa ikki ein, ið rýmdi undan dagsins realitetum, men samstundis var hon gripin av einum sterkum himmallongsli, og í gleðini um tað komandi sang hon mangan um himmalin.

Og meðan hon fyrireikaði seg til Guds æviga ríki, so var hon eisini altíð klár til dagin, og nú hugsi eg um t.d klæðir og orðna negl, fyri ikki at tala um hárið, ið skuldi liggja væl.

Jú, eitt sindur forfongiligur hevur man væl loyvi at vera.

Men eingin okkara var í iva um, at Elsa megnaði at skina ímillum tað neyðuga og so tað alneyðuga, og tað leiðir tankarnar til Rómverjabrævið, har skrivað stendur:

Tí at hvør tann, sum ákallar navn Harrans, skal verða frelstur.

Frá hesum ómetaliga stóra og náðifulla lyfti ljóðar tað so víðari:

Hvussu skulu tey tá ákalla tann, sum tey ikki trúgva á? Og hvussu skulu tey trúgva á tann, sum tey ikki hava hoyrt um? Og hvussu skulu tey hoyra, uttan at onkur er, sum prædikar? Og hvussu skulu teir prædika, uttan at teir verða sendir?

Og við góðum minnum um Elsu stendur síðani skrivað: Hvussu yndisligir eru føtur teirra, sum boða gleðiboðskapin um hitt góða!

Og so leggur ápostulin afturat: So kemur tá trúgvin av tí, sum verður hoyrt, men tað, sum verður hoyrt, kemur gjøgnum orð Krists.

Hoyr! Kristi orð er tað skapandi orðið, sum við Heilaga andanum leggur trúnna í hjørtuni, og júst tí skulu vit ikki prædika so nógv um trúnna sjálva, men heldur prædika Guds orð til trúgv, og tað veri seg í Guds missión bæði heima og úti.

Og sum unglingi minnist eg, hvussu Elsa mangan tók hesi orð fram, tá ið hon var heima:

Akurskurðurin er mikil, men arbeiðsmenninir eri fáir. Biðið tí hann, sum akurskurðin eigur, at hann vil senda út arbeiðsfólk at heysta inn skurðin.

Jú, neyðin fyri teimum ónáddu fólkasløgunum lá Elsu á hjarta, og fyri henni var Etiopia ikki eitt ævintýr men eitt kall, har hon sum sjúkrasystir og jarðarmóðir stóð í tænastu, ið hevur verið hópin av menniskjum til hjálpar og bata.

Jú, diakoniin fylti nógv í tí dagliga. Men mær er eisini fortalt, hvussu nógv Elsa brendi fyri at fáa lívsins Orð boðað. Og tað gjørdi hon við tí lutherska princippinum um lóg og evangelium.

Lógin skal jú prædikast fyri at vit koma at kenna Guds vilja og samstundis erkenna syndina í egnum lívi.

Evangeliið tørvar okkum at hoyra, so vit kunnu taka ímóti tí, sum Jesus gjørdi fyri okkum á krossinum, har hann sónaði alla synd heimsins.

Og við uppreisn Jesusar frá deyðum er okkum eisini givið ævigt lív at liva, og tað avspeglar longu Guds kærleika í hesum heimi.

Jú, Guds kærleiki í Jesusi Kristi megnar at skapa nýtt lív og samstundis vísa menniskjum á, hvør Gud veruliga er.

Og tí mega vit altíð royna at fáa tað týðiliga fram, at eitt og hvørt menniskja er elskað og dýrabart í Guds eygum.

Ongan hevur hann gloymt, og fram um alt annað ynskir Gud, at menniskju finna hvílu hjá sær.

Og soleiðis kunnu vit ikki annað enn í kærleika fylgja menniskjum og vísa teimum á tað ljósið, ið hevur mátt á myrkrinum, um tað bara sleppur til.

Og nú fara vit skjótt at syngja:

Í tí myrku nátt áminnir

sum ein viti Jesunavn,

og hvør hjálparleysur finnur

inn í tryggu himmalhavn.

Og tá sólin meir ei skínur,

lýsir Jesunavn á nátt,

og hin frelsti flokkur trínur

fyri Gudi og syngur hátt:

Eg má elska Jesunavnið;

frelsu, frið í tí eg fann,

andans eld fekk í hans favni.

Eingin frelsir uttan hann.

Andliga myrkrið í Etiopia var sambært Elsu krunkasvart, – men hoyr: Jesunavnið aldri bliknar.



Og sum ávøkstur av Orðsins boðan av Jesusi Kristi kundi Elsa nú eisini gleðast um eina enorma veking í Etiopia síðstu mongu árini.

Og hvat er størri, enn at menniskju verða flutt frá myrkri til ljós, frá andligu deyða til andligt lív.

Hyggja vit at Elsu og lívi hennara, so mega vit bara staðfesta: Hon livdi ikki fyri sær sjálvum, men fyri Jesusi.

Og við livandi vón kunnu vit bara gleðast um, at ein dag skulu øll kristin síggjast aftur, takka veri Jesu dýrabara blóði, ið rann fyri allar syndir okkara.

Í tí sambandi vil eg siga – við Elsu sum fyrimynd:

Liva vit í fyrigeving syndanna í hennara dirvi og anda, í og undir orðinum, tænandi við góðum gerningum, vísandi fólkinum á Jesus, ja, so er veruliga vón fyri framman.

Máttu vit øll veri lýðin okkara dagliga kalli.

Nógv annað kundi verið sagt, men fram um alt vil eg eftir Elsu´sa vilja eisini at enda vísa til Jesus, ið kom til jarðar fyri at tæna og geva sítt lív sum eitt loysigjald eisini fyri teg og meg.

Tann sum hevur oyru at hoyra við, hann hoyri.

Amen.

**Latum okkum biðja!**

Kæri himmalski faðir, takk fyri at vit hesa løtu kunnu minnast Elsu við kærleika, fyri kærleika hennara.

Takk fyri alt tað, hon var fyri síni og so ómetaliga nógv onnur bæði í Føroyum, Etiopia og aðrastaðni við.

Trúfastur ert tú kalli tínum, og vit biðja teg: Kalla enn tænarar og sendiboð í títt stað við tí gleðiboðskapi, ið er tín kraft til frelsu fyri hvønn tann, sum trýr.

Góði Harri og frelsari. Menniskju tørva enn hjálp tína, bæði úti og heima, men hesa løtu vilja vit serliga biðja fyri Jákupi og Jóhannesi, konum og børnum teirra.

Síggj eisini til systkin og aðrar góðar vinir.

Lat øll, ið sakna og syrgja Elsu, kenna troyst, ugga, frið og ikki minst livandi vón frá tær.

Hesa løtu leggja vit hvønn annan í tínar almáts-hendur við tøkk fyri verk títt og alt tað góða, tú gjørdi fyri og ígjøgnum Elsu. Lat tína missión liva í hjørtum okkara. Tað biðja vit um í Jesu navni! Amen.

Við hesum orðum vilja vit her frá Gøtu kirkju lýsa frið yvir minni um Elsu.



*Hendan myndin er frá 1995. Frá vinstru, Lea, systir Elsu, Hanna, systir Doris Heinesen, Sui, Elsa og Elsebeth Nielsen úr Danmark.*

Nr. 6   September 2017   69. árið

# Ársmøti Kirkjuliga Missiónsfelagsins

***Missiónshúsið við Landavegin,***

## Fríggjadagur 22. september

Kl. 20.00 Møti við Odd Dubland

Sangluttøka við Jan Jacobsen

**Drekka**

## Leygardagur 23. september

Kl. 10:00 Morgunmatur

Kl. 10.30 Bíbliutími við Silas Olofson

**Døgurði**

Kl. 16.00 Bíbliutími við Odd Dubland

**Nátturði**

## Leygarkvøld

Kl. 20.00 Møti við Odd Dubland
Sangluttøka við Argjakórinum

**Drekka**

## Sunnudagur 24. september

**Døgurði**

Kl. 18.00 Møti við Odd Dubland
Sangluttøka við Julionnu Olofson

**Nátturði**

Útgevari
Kirkjuliga Missiónsfelagið
Purkugerði 7
Fo- 100 Tórshavn
t- postur: kmf@kmf.fo

Heimasíða: www.kmf.fo
Ábyrgd: Silas Olofson
tel: 266968
Prent: KMF
Konta: 9181- 495.337.3

Kirkjuligt Missiónsblað
kemur út 8 ferðir um árið
(februar, mars, mai, juni, august
september, november og desember
Haldaragjald: kr. 200,00